## Tøfting sum boksari

Stig Tøfting, sum mest er kendur sum ein harður hundur á miðvøllinum, hevru nú kastað seg yvir ein annan ítrótt, nevniliga boksing. Hann skal í ringin fyrstu ferð 21. februar, tá hann skal boksast móti danska show-wrestlaranum, Sidney Lee. Tað ber til at spæla upp alt møguligt í dystinum, eitt nú um Tøfting fer at bíta oyrað av Lee, ella um Sidney Lee fer at rýma úr ringinum mitt undir dystinum. Stig Tøfting er annars hjálparvenjari hjá SAS ligafelagnum Randers FC.



## Mótmæla vitjan hjá Dalai Lama

Í síðstu viku vóru umboð fyri kinesisku sendistovuna í Íslandi á fundi við stjórnina í Reykjavík, har tey mótmæltu, at andaligi leiðarin hjá tibetanum, Dalai Lama, er boðin til Íslands at vitja í summar. Í uttanríkisráðnum fingu kinesisku diplomatarnir at vita, at tað er ein privatur felagsskapur, sum hevur boðið Dalai Lama til Íslands, og tí er ikki talan um eina almenna vitjan. Ætlanin er, at Dalai Lama, sum hevur fingið friðarheiðursløn Nobels, skal vitja í Íslandi frá 1. til 3. juni.

# Hundar fara í hundarnar av fýrverki

**Fýra ára gamla Freja hjá Jónu Mortensen er ein av hundunum í Havn, sum hvørt vikuskiftið er ræðsluslígin, tí fýrverk verður skotið. Hetta hevur við sær, at tíkin hvørt vikuskiftið fær nervamedisin frá djóralæknanum. Hetta er brot á politiviðtøkurnar, so tað er bara at melda, sigur løgreglan**

HUNDALÍV
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Tað er næstan hvørt vikuskifti, at Freja kemur í dýrastu neyð av fýrverki, sigur Jóna Mortensen. Hon nevnir eisini, at tað eru nógv onnur, sum hava sama trupulleika.

- Er hetta um kvøldarnar, so er tað brot á politiviðtøkurnar, sigur Per Persson, politistur. Hann greiðir somuleiðis frá, at hetta kann vera brot á aðrar lógir.

### Nervavrak

Tað vísir seg, at tað serliga er í samband við brúdleyp og aðrar gleðisløtur, at fýrverk verður skotið. Men hetta hevur við sær, at nógvir hundar - serliga í Havn - gerast sera bangnir.

- Freja er vorðin eitt veruligt nervavrak. Eg havi fyri kortum fingið nýtt nervamedisin frá djóralæknanum, sum tekur tað ringasta av ræðsluni, sigur Jóna Mortensen, hundaeigari.

Djóralæknatænastan kennir væl trupulleikan.



*Freja er ein av hundunum í Havn, sum hevur stórar trupulleikar av fýrverki hvørt vikuskifti*

- Hetta er ein trupulleiki allastaðni hundar eru. Men tað er serliga í Havn, at hetta vendir aftur hvørt vikuskifti, sigur Jústines Olsen, djóralækni. Sjálvur kann hann tó ikki gera nógv meira, enn at geva hundaeigarunum góð ráð og hundunum heilivág.

- Tey kunnu koyra hundarnar inn í rúm, har onki ljós kemur inn. Tey kunnu eisini koyra tónleik frá, fyri at doyva buldrini. Vit kunnu eisini geva teimum medisin, men hetta er nakað, ið skal vera fyrireikað frammanundan, staðfestir Jústines Olsen.

### Nýggjárið er eitt

Jústines Olsen greiðir frá, at um nýggjárið er fýrverkið ikki ein so stórur trupulleiki, tí tá vita fólk av, at okkurt er í væntu, og kunnu tí verja hundarnar.

- Tað er nakað heilt annað, tá tað brádliga kemur í. Tá tað er okkurt tilvildarligt vikuskifti, tá kunnu fólk á ongan hátt verja hundarnar hjá sær, tí tey vita ikki, at buldur og brak verður um allar geilar, sigur djóralæknin.

### Skulu melda

Sambært politinum skulu fólk bara melda tílíkar tilburðir, tí so verður málið tikið upp, og talan er um brot á politiviðtøkurnar, tá fýrverk og onnur skot verða latin av.

- Tað er beinleiðis brot á politiviðtøkurnar at geva tílíkan larm á náttartíð. Tí er bara at melda, um hesin trupulleiki er, staðfestir Per Persson.

# Gongur ongan veg at tosa um lønarhækking

**Starvsmannafelagið hevur tosað við fíggjarmálaráðið um hægri løn, men enn er onki komið burtur úr**

- Vit tosa saman, men enn er onki komið burtur úr.

Selma Ellingsgaard, forkvinna á Starvsmannafelagnum, kann ikki annað enn ásanna, at tað gongur rættiliga strilti hjá teimum at tosa við fíggjarmálaráðið um at fáa hægri løn.

Starvsmannafelagið gjørdi í 2006 ein fýra ára sáttmála, sum gongur út í 2010.

Men í sáttmálanum tryggjaði felagið sær, at henda broytingar í samfelagnum sum ávirka lønarlagið munandi, skuldi tað bera til at samráðast um lønina av nýggjum frá 1. oktober í fjør.

Og tað var rættiliga skjótt, at tíðirnar broyttust so nógv, at felagið metti, at tað hevði rætt til nýggjar lønarsamráðingar.

Men tað hevur gingið strilti og tað er ikki fyrrenn beint nú, at felagið hevur fingið fíggjarmálaráðið á tal.

- Vit hava eitt samskiftið við fíggjarmálaráðið, men enn er onki komið burtur úr, sigur Selma Ellingsgaard.

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur mestsum greitt afturvíst, at tíðirnar eru ikki til at økja útreiðslurnar hjá landskassanum við lønarhækkingum.

Og Selma Ellingsgaard vil ikki, hvussu veruleikakent tað er at vænta sær nakra lønarhækking, sum støðan er.

Tað fái eg onki sagt um. Hvat ið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur, má standa fyri hansara egnu rokning, sigur Selma Ellingsgaard.



*Forkvinnan í Starvsmannafelagnum sigur, at tey tosa saman, men enn er onki komið burtur úr*